

## Picasso í Fuglafirði

Sangleikur – Picasso kemur í morgin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. 4. flokkur í Fuglafjarðar skúla hevur síðani februar vant sangleikin: Picasso kemur í morgin, sum Frits Johannesen hevur skrivað og tónsett. Hetta snýr seg um Picasso, sum kemur at vitja børnini í 4. flokki. Tey tosa um, hvar frá hann er ættaður, hvussu hann sær út, um hann er giftur ella leysagiftur, málningar hansara og um málningarnar, sum børnini sjálvi hava málað. Eisini verða yrkingarnar at hoyra í leikinum: Tað brenna túsund ljós í kvøld, sum Hans A. Djurhuus hevur gjørt, og Eyðun á Lakjuni hevur smíðað, Sá eg bros av sama yrkjara, og sum Jógvan á Lakjuni hevur gjørt lagið til. Jógvan á Lakjuni hevur klaverfylgisspælið.

## Vit seta bilin og ganga

Sum ein liður í rørsluárinum 2009 fer Fólkaheilsuráðið at skipa fyri eini viku í mai, har øll sum koyra til arbeiðis, skulu seta bilin og í staðin ganga. Talan er um dagarnar frá 25. til 31. mai.

Fólk skulu ganga til arbeiðis, ganga frá arbeiði, ganga í skúla, ganga til handils, ganga til ítrótt, ganga til bingo... ja, seta bilin og ganga (ella súkkla…).

Fyrimunirnir eru nógvir. Fyrst og fremst er tað ein vinningur frá einum heilsusjónarmiði, um fólk seta bilin og røra seg í staðin. Men sanniliga eisini frá einum umhvørvis- og sparisjónarhorni: eingin bensinosur og bíligari hjá fólki. Tað er eisini hugaligari at ganga, tá ið øll onnur gera tað. Tað verður meira lív í gøtunum, tryggari og friðarligari.

Ætlandi skulu ØLL vera við í hesum tiltaki: Tey ið hava stutt til arbeiðis, tey ið hava langt til arbeiðis og eisini tey, ið koma av bygd, kunnu annaðhvørt taka bussin ella seta bilin langt frá arbeiðsplássinum og síðani ganga. Við hesum brævi biðja vit tykkum um at eggja starvsfólki á tínum arbeiðsplássi til at seta bilin.

Um hetta tiltakið skal eydnast, mugu allar fyritøkur í Føroyum luttaka og royna at eggja sínum starvsfólki til at seta bilin og heldur fara til gongu. Hetta kann gerast hvør sær, men eisini hevði verið stuttligt um fyritøkan í felag við starvsfólki skipaði fyri kappingum, útferðum ella onkrum heilt øðrum - tit avgerða púra sjálvi hvussu tit leggja útivikuna til rættis.

Fólkaheilsuráðið vil við hesum maili heita á tykkum og starvsfólk tykkara um at taka undir við hesum tiltaki. Vit ringja ein av komandi døgunum til tykkara, at frætta meir um hvussu tit ætla at skipa tiltakið á tykkara fyritøku.

# Berg Motors samráðast við Renault

Síðan VR-Bilar góvust á nýggjárinum, hava Renault einki umboð havt í Føroyum. Herfyri settu Renault Danmark seg í samband við Berg Motors um at umboða teirra bilar.

Stjórin í Berg Motors, Jóhannes Berg, sigur, at í løtuni eru samráðingar millum partarnar, men eingin avgerð er tikin enn. Spurdur um hví Berg Motors hava fleiri nýggjar Renault bilar standandi í J. Paturssonargøtu sigur hann, at teir eru bidnir um at hava hesar 18 bilarnar í varðveitslu fyri Renault Danmark.



*Nýggir bilar hjá Renault Danmark í varðveitslu hjá Berg Motors*

Renault bilar hava verið umboðaðir í Føroyum í mong ár. John W.Thomsen í Klaksvík seldi Renault í 60-unum, eitt skfti var Valdemar Lützen umboð fyri Renault, í sambandi við at teir vóru franskt konsulát í Føroyum, síðan hava Ivan Johansen, Brøður Petersen og VR-Bilar selt Renault.

Renault er ein av elstu bilverksmiðjum í heiminum, stovnað í 1899 í Fraklandi. Renault er høvuðspartaeigari í Nissan Motor Company, sum er triðstørsti japanski bilframleiðari. Í dag eru nógvir Renault og Nissan bygdir yvir somu plattformar. Renault eiga eisini rumensku Dacia bilverksmiðjuna.

*mg*

# Rørslufundur í Suðuroy

**Rørslu-ár, rørsludagar, rørslu-vikur, úti-vikur ítróttarnátt, set bilin, gang í kirkju, gang á møti, statt upp og gakk, tak teg saman, o. s. fr.**

**RØRSLA**
*Dávur Winther*

Hetta eru setningar og herróp, sum í hesum døgum vera havd á lofti, uttan tó at hava fingurin á lofti. Kveikjandi fundir eru kring alt landið, har tað við kunning av ymiskum slagi verður eggjað fólki til at røra seg meir.

Blóðtrýst, byrjandi sukursjúkur, strongd, betri orka, at kenna seg betri sálarliga og kroppsliga og mikið meira er endamálið við rørsluátakinum. Eisini verða færri innleggingar av ymiskum slagi vegna eina størri rørslu millum fólk.

At barnagarðar, skúlaungdómar, arbeiðspláss og eldrasambýlir eisini taka hetta upp er umráðandi, tí fylgiskjúkurnar eru nógvar í nútíðarsamfelagnum, har tað at sita stillur er ein »dygd«. Og tó vísir tað seg, at rørsla og likamsvirkni, eru eisini eitt størri mál hjá fleiri í nevndu bólkum.




*Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í heilsumálum, og Kaj Leo Johannesen, løgmaður. Báðir ídnir rørslumenn á hvør sín hátt: Hans Pauli sum landsstýrismaður og Kaj Leo sum ítróttarmaður*

Fyri at vísa rørsluárinum sóma og vera við til at stuðla fólki víða hvar, stovnum og virkjum í, at tað er skilagott at røra seg, vóru Kaj Leo Johannesen, løgmaður, og Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í heilsumálum, við í Suðuroy í gjárkvøldið á nýggja og flotta miðnámsskúlanum til eitt kunningarátak um rørsluárið 2009.

Ja, talan er um eina almenna fundarrøð kring landið um rørslu, sum heldur fram í kvøld á Svangaskarði á Toftum og mikukvøldið vesturi í Vágum. Eitt líknandi átak verður eisini í Fuglafirði hóskvøldið.

Annars hava slík kvøld verið í heilsubýnum Klaksvík og á Sandi áður.

Skráin í Hovi mánakvøldið var:

Vælkomin – Kaj Leo Johannesen, løgmaður og Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í heilsumálum bjóða vælkomin
Hvussu nógv røra vit okkum í Føroyum? – Pál Weihe, formaður, Fólkaheilsuráðið
Hvat ítróttafeløgini kunnu gera? – Finn Johannesen ÍSF
Býarskipan og rørsla – Dávur Winther, mentanarleiðari, Klaksvíkar Kommuna
Eldri og rørsla – Nærverkið
Rørsla á arbeiðsplássinum – Hákun Djurhuus, stjóri, SEV
Rørsla hjá børnum og ungum í skúlum – Óli Jákup Joensen varaskúlastjóri
Rørsla hjá børnum á dagstovnum – Jacob Skaaning, pedagogur
Kjak um, hvat kann gerast á staðnum

Tað var væl av fóki til tiltakið í Hovi, har fólk eisini sluppu at røra seg undir leiðslu av klaksvíkinginum Finni Johannesen frá Vilt, sum býr í Suðuroy.

Tað eru Fólkaheilsuráðið og ÍSF, sum saman við landsstýrismanninum í heilsumálum, ið eru stigtakarar til rundferðina.

Henda sama skráin verður á Svangaskarði í kvøld, men tá er tað Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum og mikukvøldið Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, sum eru við - hetta so, at tá ið rundferðin er liðug, hava øll landstýrisfólkini verið við.